# KNASSI AdManager

## Hvat er KNASSI AdManager?

KNASSI AdManager er amboði at umsita lýsingar á KNASSI.
KNASSI AdManager gevur tær fult kontrol á tínari lýsing. Tú velur sjálv/ur hvar tú vilt lýsa, hvussu nógv tú í mesta lagi ynskir at brúka uppá hvørt klikk og hvussu nógv tú í mesta lagi ynskir at brúka um dagin.

## Hví lýsa á KNASSI?

- tú avgerð hvat lýsingin skal kosta
- tú hevur fult kontroll á lýsingini
- ikki er neyðugt við hjálp frá lýsingarstovu at uppseta tína lýsing
- tú betalir bara fyri tað tú brúkar
- KNASSI hevur lægstu lýsingarprísir á marknaðinum

## Hvør kann lýsa á KNASSI?

Øll skulu kunna, og tíma, at brúka KNASSI,
tí mugu síðurnar ikki innihalda fylgjandi:

- tilfar ið er óhóskandi fyri persónar undir 18 ár
- popup-lýsingar av nøkrum sum helst slag

Allar síður fara ígjøgum eftirlit, og verða tær strikaðar
av KNASSI um vit meta at tær er óhóskandi.

## Hvussu komi eg í gongd við at brúka KNASSI AdManager?

Um tín heimasíða ikki longu er skrásett í KNASSI heimasíðuyvirlitinum, er neyðugt at skráseta heimasíðu. Tað verður gjørt við at klikkja á "Skráset heimasíðu"




*Mynd 1: Skráseting av heimasíðu*

## Skráset heimasíðu

Tøppa inn tína heimasíðu: td. www.okkurt.fo
Tøppa inn tín teldupost: td okkurt@okkurt.fo, knassar@kallnet.fo ella knassar@post.olivant.fo
Tøppa inn Loyniorð (2 ferðir): loyniorð at brúka til umsiting av skrásetin og lýsing á KNASSI.

Klikk síðan á "Skráset".




*Mynd 2: Tín umsitingarsíða*

Nú ert tú komin inná tína umsitingarsíðu.
Klikk á "Umsit Skráseting" fyri at umsita skrásetingina í heimasíðuyvirlitinum.




*Mynd 3: Umsiting av skráseting í heimasíðuyvirliti*

Tøppa inn Heiti: td. *KNASSAR Sp/f*
Tøppa inn Frágreiðing: td. *KNASSAR mennir og selur heimasíðuloysnina KNASSAR Web. KNASSAR Web er ein skipan ið er eins nemm at brúka sum vanlig tekstviðgerð.*
Tøppa inn Leitiorð: td. *knassar web internet innihaldsumsitingar skipan cms content management system*
Vel síðan teir bólkar ið tín heimasíða hoyrir undir.

Klikk á "Goym upplýsingar", og tú kemru aftur til tína umsitingarsíðu.
Klikk á "Umsit Lýsing" fyri at umsita lýsingina, ið skal vísast á KNASSI.




*Mynd 4: Skriva hvat lýsingin skal innihalda*

## Upplýsing um lýsing

Tøppa inn Yvirskrift: td. *Heimasíðu?*
Tøppa inn Innihald: td. *Vilt tú síggjast á alnótini. Vel KNASSAR Web.*



**Vel hvar lýsing skal vísast:**

| Stað: | MK | OK | KK | |
|---|---|---|---|---|
| Alla staðni | 20 | 22 | 20 | ☑ Sjónlig |
| Forsíða | 20 | 20 | 20 | ☐ Sjónlig |
| Spøl | 20 | 20 | 20 | ☐ Sjónlig |
| Tíðindi | 20 | 20 | 20 | ☐ Sjónlig |
| ** Vinnuligt | 20 | 20 | 55 | ☑ Sjónlig |
| ** Tokni | 20 | 20 | 20 | ☐ Sjónlig |
| ** Undirhald | 20 | 20 | 20 | ☐ Sjónlig |
| ** Mentan | 20 | 20 | 20 | ☐ Sjónlig |
| ** Fritid | 20 | 20 | 20 | ☐ Sjónlig |
| ** Itrottur | 20 | 20 | 20 | ☐ Sjónlig |
| ** Annad | 20 | 20 | 20 | ☐ Sjónlig |
| ** Heilsa | 20 | 20 | 20 | ☐ Sjónlig |
| ** Gransking | 20 | 20 | 20 | ☐ Sjónlig |
| ** Tonleikur | 20 | 20 | 32 | ☑ Sjónlig |
| Mat uppskriftir | 20 | 20 | 20 | ☐ Sjónlig |
| ** Kaka | 20 | 31 | 20 | ☐ Sjónlig |
| ** Forret | 20 | 31 | 20 | ☐ Sjónlig |

*Mynd 5: Vel hvar á KNASSI lýsingin skal vísast*

## Vel hvar lýsing skal vísast

MK = Minsti kostnaður fyri at vera millum 10 tær fyrstu lýsingarnar
OK = Ovasti kostnaður, kostnaðurin fyri at koma ovast av lýsarunum
KK = Klikk kostnaður (Lýsingarstig tú í mesta lagi ynskir at brúka uppá hvørt klikk á lýsingina)

Set KK til tey lýsingar stig tú ynskir at brúka uppá hvørt klikk og set flugubein í

Sjónlig, har tú ynskir at lýsa.

Alla staðni merkir at tín lýsing er við allastaðni. Um tú hevur sett flugubein í allastaðni so ert tú við í øllum bólkum , leitiorð , tíðindi o.s.v. so er bert neyðugt at krossa av aðrastaðni har tú setur hægri KK enn tað tú hevur valt til alla staðni.

Tað er møguligt at hava ymisk KK alt eftir hvussu høgt tú ynskir at koma inn í tey ymisku støðini.




*Mynd 6: Vel hvørjum bólkum lýsingin skal vísast á*

## Bólkar

Ovast setur tú klikk kostnaðin ( KK ) ið tú ynskir at brúka uppá teir bólkar tú setur flugubein í niðri undir.

Síðan er bara at seta flugubein í teir bólkar tú ynskir at lýsa í

Tað er møguligt at seta fleiri flugubein.




*Mynd 7: Hvørji leitiorð vilt tú gjalda eyka fyri*

## Leitiorð

Ovast setur tú klikk kostnaðin ( KK ) ið tú ynskir at brúka uppá tey lýsingar orð tú tøppar inn niðri undir.

Tøppa leitiorð inn ið tú ynskir tín lýsing skal vera víst hjá.

Fleiri orð kunnu tøppast inn sundur skild við komma ( , ) dømi:
*internet , heimasíðu , knassar  web , heimasíða , knassi*

Vit hava valt ikki at seta komma ( , ) millum knassar web tí vit ikki ynskja at vera funnin um onkur leitar eftir Web, men bert um onkur leitar eftir knassar web.

Seinast innsetur tú stig í lýsingin í mestalagi kann brúka um dagin. Um tú ikki ynskir at lýsingin skal vísast enn, setur tú tað til 0.

Klikk so á "Goym upplýsingar"

Tá vit síggja at tú hevur goldið verður tí konto aktivera og skráseting og lýsing verða víst.

Tú kanst altíð logga á aftur og gera broytingar í lýsing og skráseting. Eitt nú tá tú fær nýggja vøru, ella okkurt annað spennandi.

**Vert at vita:**
Tú betalir altíð bert 1 stig meir enn tann beint undir tær vil gjalda fyri plaseringina uppi ið tú fært.

Dømi tríggir lýsarar velja at lýsa á forsíðu.

1. setur kk til 30
2. setur kk til 40
3. setur kk til 50
4. setur kk til 30
5. setur kk til 30
6. setur kk til 20

So kemur nummar 3 ovast hon betalir 41 stig fyri at vera ovast.
Nummar 2 kemur næst ovast hon betalir 31 stig.
Nummar 1 kemur trið ovast hon betalir 30 stig.
Nummar 4 kemur fjórð ovast hon betalir 29 stig.
Nummar 5 kemur fimt ovast hon betalir 21 stig.
Nummar 6 kemur niðast og betalir 20 stig.

Nummar 1 , 4 og 5 skiftast um plaseringarnar og gjøldini tí tey hava valt sama kk